e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# HB skal aftur eystureftir

*Intertoto Cup: Fyri fjór›u fer› í sjey ár skal HB spæla altjó›a fótbólt í Eystureuropa*

Ta› er synd at siga, at eydnan er vi› føroyskum fótbólti, tá lutur ver›ur kasta›ur í europeisku kappingunum. Ta› eru bara f‡ra mána›ir sí›ani, at landsli›i› í sta›in fyri stóru og áhugaverdu vestureuropeisku londini kom í HM undankappingarbólk saman vi› Jugoslavia, Russlandi og Slovenia. Og í fyrradagin var marran, sum feløgini í Føroyum eins og alla a›ra sta›ni í Vestureuropa síggja fótbóltsfer›ir eystureftir at vera, aftur á kroppinum á føroyskum fótbólti.

Í UEFA var› lutur kasta›ur um, hvussu li›ini skulu greipast í Intertoto kappingini. Ta› er greitt, at HB, sum enda›i á fjór›a plássi í landskappingini í fjør, skal umbo›a føroyskan fótbólt. Nú er greitt, at HB í fyrsta umfarinum skal hitta eitt av ungversku feløgunum. Hvat li›i› ver›ur er ikki greitt enn, tí landskappingin í Ungarn ver›ur ikki li›ug fyrrenn um mána›arskifti› mai/juni.

Fyrri dysturin millum HB og ungverska li›i› ver›ur 17. ella 18. juni, og eina viku seinni ver›ur returdysturin á skránni. Vi› úrslitunum í huga, sum føroysk li› á›ur hava fingi› í europeiskari kapping móti ungverskum li›um, er ta› líti› sannlíkt, at HB sleppur ví›ari í næsta umfari›. Um ta› skuldi hilnast væl hjá HB, so er greitt, at teir í næsta umfarinum eisini skulu eystureftir. Lutakasti› laga›i ta› solei›is, at vinnarin millum HB og ungverska li›i› skal hitta vinnaran millum eitt li› úr Kroatia og eitt li› úr Jugoslavia!

Sí›ani 1993 hevur HB sjey fer›ir tiki› lut í europeisku kappingunum. Ta› fyrsta ári› vóru teir í Letlandi og í Rumenia. Í 1996 vóru teir í Georgia, og nú skulu teir til Ungarn og kanska Kroatia ella Jugoslavia. Bæ›i í fjør og í fyrraári› vóru teir eisini eystanfyri, men ta› mundi kennast ólíka lættari at fer›ast til Finnland enn til gomlu kommunistisku londini.

KÍ skal luttaka í fyrsta innlei›andi umfarinum til europeisku meistarakappingina, og GÍ og B36 skulu luttaka í UEFA Cup. Hvørjum føroysku li›ini skulu spæla ímóti ver›ur ikki greitt fyrrenn eftir fyrsta juli. Men sannlíki› er stórt fyri, at okkurt av hesum trimum li›unum eisini skal eystureftir.

Sí›ani gamla Sovjetsamveldi›, gamla Jugoslavia og gamla Kekkoslovakia vór›u li›a›i sundur, er tali› av eystureuropeiskum li›um í Europa Cup fleirfalda›.

**jh**

## Steypakappingin komin í tí›arney›

*Løgmanssteypi›: Allir tríggir dystirnir í hesi vikuni eru útsettir, og nú ver›ur torført at fáa teir avgreiddar, á›renn fyrsta umfari› í landskappingini er á skránni*

Kavin argar enn eina fer› kappingina um løgmanssteypi›. Tveir dystir skuldu havt veri› spældir í gjárkvøldi›, men teir vór›u bá›ir avl‡stir. Annar dysturin var í Sumba, har grannarnir úr Vági skuldu vitja. Hin dysturin var í Gøtu, har HB skuldi havt spælt í gjárkvøldi›.

Tri›ji dysturin er tann, sum í kvøld skuldu veri› spældur í Runavík í kvøld. Seinnapartin í gjár var avger›in um avl‡singina ikki tikin, men tá var nógvur kavi á vøllinum í Runavík, og ta› skuldu stórar broytingar til, um dysturin skuldi spælast í kvøld.

### Tí›arney›in

Sambært skránni er ætlanin, at sí›sta umfari› í bólkaspælinum skal spælast annan leygardag, sum er páskaaftan. Men um ta› ikki eydnast at spæla útsettu dystirnar í hesi vikuni, so ver›ur ta› sera torført ella helst ómøguligt at avgrei›a alt bólkaumfari›, á›renn ta› 2. páskadag ver›ur fari› undir landskappingina í 1. deild.

Og um ta› ikki eydnast at spæla li›ugt fyri páskir, so fer ta› ikki at bera til at spæla allar teir útsettu dystirnar fyrrenn fyrst í mai. Landsli›i› skal av landinum í vikuni eftir páskir. KÍ og HB, sum eru luttakarar í útsettu dystunum, eiga fólk í landsli›shópinum. Úr Sumba og VB, sum eiga ein steypadyst á, eru eingir í landsli›shópinum, og tí ber til at fáa dystin í Sumba avgreiddan, me›an landsli›i› er í Liktinstein.

Stø›an í steypakappingini er á ongan hátt solei›is, sum hon var t. d. í fjør, tá arbei›sste›gurin hev›i vi›sær, at strandfer›sluskipini ikki sigldu og ta› tískil var sera torført hjá fótbóltsfer›ali›unum at koma til dystirnar. Sambært skipanini eru fjór›ingsfinalurnar ikki fyrrenn sunnudagin 21. mai. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at ta› fer at bera til at spæla útsettu dystirnar mitt í fyrstu vikuni av mai.

Men skal ikki rættuligur stígur koma í, so er ney›ugt, at kavin ver›ur burtur komandi vikuskifti og ikki vísir seg aftur í dymbildaga vikuni. Sambært skránni skulu seks dystir í kappingini um løgmannsteypi› spælast sunnudagin, seks skulu spælast skírisdag og aftur seks páskaaftan.

**jh**

# Dómari mundi komi› illa fyri

*Løgmanssteypi›: Petur Reinert, i› var á veg til Sumbiar at døma, var í bussinum, sum fór var› tikin út av vegnum omanfyri Nor›skála*

Ta› kemur fyri, at ta› ver›ur mett ney›ugt at leggja ikki so líti› fyri, tá fótbóltsdystir skulu fáast frá hondini. Eitt dømi um hetta var í gjár, tá dómarin, sum var á veg til Su›uroyar at halda skil á sumbingum og vágbingum, fór út av vegnum, á›renn hann frætti, at dysturin var avl‡stur.

Petur Reinert í Leirvík var settur at døma dystin í Sumba, sum sambært upprunaligu skránni skuldi veri› spældur sí›sta sunnudag. Skráin var› seinni broytt, dysturin var fluttur til í gjárkvøldi›, men ætlanin var framvegis, at Petur Reinert úr Leirvík skuldi su›ur at døma:

– Eg var í sambandi vi› formannin í dómaranevndini mánadagin fyri at frætta, um dysturin var útsettur. Óli Holm seg›i, at teir bí›a›u fyri at síggja, hvussu ve›ri› fór at taka seg upp, og tí var eg á veg su›ur í morgun, seg›i Petur Reinert seinnapartin í gjár.

Petur fór úr Leirvík klokkan sjey í gjáramorgunin. Avrátt var, at hann á Oyrabakka skuldi koma í fer›alag vi› Jógvan Arnfinn Jacobsen, i› skuldi su›ur vi› sum hjálpardómari. Hin linjuverjin skuldi finnast í Su›uroy.

Men Petur Reinert kom ongantí› til Oyrabakkar og tískil heldur ikki til Su›uroyar:

– Bussurin fór út av vegnum, tá vit komu oman um bilverjuna, og eg eri sera fegin um, at vit komu burtur úr tí í øllum gó›um. Bussførarin var sera varin, men tá vit komu út úr tunnlinum var so hált, at har var einki at gera. Bussurin fór fyrst inn í sí›una á einum stórum bili hjá OCD, sum stó› har, og so fóru vit akandi framvi› honum. Tá vit komu oman um trailaran tóktist vandin vera av, men so tók ein hvirla í bussin, sum fór út av vegnum. Gronin fór fyrst út av. Eg kendi ta› solei›is, at afturhjóli›, sum var uppi á vegnum, eina løtu viga›i á, men tíbetur stó› bussurin og fór ikki runt. Hev›i hann fari› runt, hev›i ska›i ivaleyst sta›ist av.

Tá fer›afólkini komu ni›an á vegin, ringdi fartelefonin hjá Peturi Reinert, sum var á veg til Sumbinar at døma. Ta› var forma›urin í dómaranevndini, sum bo›a›i frá, at dysturin á Krossinum var útsettur, tí líkindini vóru so vánalig í Sumba.

Seint fyrrapartin var Petur Reinert aftur til arbei›is, og so mugu vit vóna, at ta› fer at eydnast betur, tá hann næstu fer› skal vera dómari!

**jh**

www.sosialurin.fo



# Tveir av heimsins bestu svimjarum vitja her á landi

*Hósdagin 6. apríl komu tveir svimjarar úr Danmark upp til Føroya. Svimjararnir hava bá›ir brek, og teir teljast ímillum heimsins bestu svimjarar fyri breka›. Tann eini er enntá heimsmeistari, og teir eru í Føroyum fyri at uppl‡sa um svimjing fyri breka›*

Heini í Skorini

Hósdagin komu tveir svimjarar, sum vanliga svimja á sera høgum stø›i, úr Danmark til Føroya. Svimjararnir eru breka›ir, og teir eru millum fremstu svimjarar fyri breka› í heiminum. Tann eini er enntá heimsmeistari í greinunum 50 m frí og 400 m frí, og hann er í bólki 6, ta› vil siga, at hann hevur eitt heldur stórt brek. Bá›ir eru sum sagt úr Danmark, og dagliga venja teir saman vi› fólki, sum ikki eru breka›. Teir venja í feløgunum Triton og Sigma, og teir eita Peter Lund Andersen og Martin Jacobsen. Ta› er Peter Lund Andersen sum er heimsmeistari í 50 m og 400 m frí, me›an Martin Jacobsen hevur vunni› hei›ursmerkir í bæ›i europameistaraheitinum og heimsmeistaraheitinum. Í oktober mána›i skulu teir bá›ir luttaka í Olympiaduni fyri breka›. Katrin Johansen, sum vit jú kenna sum ein av fremstu føroysku svimjarum fyri breka› sigur, at teir eru her fyri at uppl‡sa um svimjing fyri breka›, og teir leggja samstundis dent á, at hóast ein er breka›ur, ber væl til at koma langt í svimjing, um ein venur nóg nógv.

-Hetta eru tveir svimjarar á sera høgum stø›i, sum klára seg væl í stórum útlendskum kappingum. Teir eru her fyri at uppl‡sa um Olympiaduna (Paralympics) fyri breka›, har teir sum sagt skulu luttaka í oktober, og vit í Føroyum hava eisini tveir ungar svimjarar, sum skulu luttaka í hesi kapping. Ta› eru genturnar Esther Gaard Hansen og Heidi Andreasen.

Katrin leggur afturat, at tann eini, Martin Jacobsen, enntá ver›ur stu›la›ur ella sponsorera›ur av Team Danmark.

Teir komu til Føroya mikudagin, og høvdu so ein fyrilestur hóskvøldi›, har teir kunna›u áhoyrarnar um kappingina teir skulu luttaka í, og tosa›u eisini um svimjing fyri breka› sum heild, og løgdu dent á, at hóast ein er breka›ur, ber væl til at koma langt í svimjing. Fyrilesturin var fyri øll, svimjarar, foreldur, o.s.fr.

Me›an teir hava veri› her, hava teir vant vi› fyrsta li›i hjá Havnar Svimjifelag, og teir fóru avsta› aftur til Danmarkar mánadagin 10. apríl.

# Væleydna›ur ÍSB fundur

*Leygardagin 8. apríl var fundur fyri nor›urlendsku ítróttarfelagsskap-irnir fyri breka› hildin á Hotel Hafnia. Hæddarpunkti› á fundinum var, at Grønland kom uppí felagsskapin sum sjeynda landi›*

Heini í Skorini

Stórur fundur var leygardagin 8. apríl á Hotel Hafnia. ÍSB skipa›i fyri fundinum, og var fundurin fyri allar nor›urlendsku felagsskapirnir fyri breka›. Londini, sum vóru umbo›a› á fundinum, vóru Danmark, Noreg, Svøríki, Finland, Føroyar, Ísland, og so var› Grønland tiki› vi› sum n‡ggjasta landi› á fundinum.

Ta› er solei›is, at tvær fer›ir um ári› møtast allir limirnir fyri nor›urlendsku ítróttarsambondini fyri breka›. Seinast var fundurin í Íslandi, men hesafer› var hann so í Føroyum, orsaka› av at ÍSB jú eisini í ár hevur 20 ára hátí›arhald. Sum sagt var Grønland tiki› vi› í nor›urlendska ítróttarfelagsskapin fyri breka›, sum eitur Nord-HIF (Nord-handicappede idrætsforbund).

-Vit eru ógvuliga gla›ir fyri, at Grønland nú er tiki› vi› í Nord-HIF, og serliga stuttligt var ta›, at ta› hendi júst í Føroyum, tí vit hava jú havt so tætt tilkn‡ti til Grønland, sigur forma›urin í ÍSB Jógvan Jensen.

Tey mál, sum annars vóru vi›gjørd á fundinum, var Olympiadan fyri breka›, sum ver›ur í Oktober mána›i í Sydney, og ætlan var eisini løgd fyri nor›urlendska meistaraheitinum fyri breka›.

Sum sagt vóru allir nor›urlendsku formenninir frá á›urnevndu sjey londunum til sta›ar, og fríggjadagin var skipa› fyri einum túri kring Føroyar, so hesir formenn sluppu at síggja eitt sindur av okkara vakra landi. Teir vitja›u m.a. virki hjá Edmundi Joensen á Oyri, Føroya Bjór í Klaksvík, b‡ra›i› í Klaksvík, og sí›ani enda›i fer›alagi› á Hotel Nor› á Vi›arei›i, har bor›reitt var vi› lunda. Á veg heimaftur vitja›u tey so Gøtu kirkju og Tøting, sum jú eisini liggur í Gøtu. Leygarkvøldi› var so ein veitsla hildin í MBF húsinum fyri øllum formonnunum, so ikki kann sigast anna›, enn at hetta var ein væleydna› vitjan, og eitt stak gott 20 ára hátí›arhald hjá ÍSB.